# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 15.11.2024 |
| Mál nr.: | 24/24874 |
| Málsviðgjørt: | EØ |
| Ummælistíð: | 15.11.2024-<br>10.12.2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan<br>dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
(Innskriving á Familjutænastuni)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 29. mai 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 15, stk. 1. nr. 2 verður orðað soleiðis: “veita familjuviðgerð ella líknandi stuðul, harundir dag- ella samdøgursviðgerð,”

**2.** § 15 a, stk. 1. verður orðað soleiðis: “ Barnaverndarnevndin kann innskriva familju til familjuviðgerð á stovn sambært § 15 stk. 1. nr. 2.”

**3.** § 15 a, stk. 3 verður orðað soleiðis:” “Barnaverndarnevndin kann veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið standast av fyriskipan eftir stk. 1 og stk. 2 og eftir § 15 stk. 1. nr. 2. Um familjan verður innskrivað sambært § 15 stk. 1. nr. 2 til familjuviðgerð, fáa foreldrini endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tó í mesta lagi við eini upphædd samsvarandi við hægstu sjúkradagpeningaveiting”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Familjudepilin, sum var stovnur undir Almannaverkinum, lat aftur í 2022, m.a. tí avbjóðingar vóru við hølisviðurskiftunum og við at skaffa skikkað fólk.

Barnaverndatænastur kring landið hava víst á týdningin av einum døgntilboðið til familjur, sum hava avbjóðingar við foreldraførleikanum og við at fáa børnini at trívast, sum kann vera við til at fyribyrgja umsorganaryvirtøku av børnum í ávísum førum.

Almannaverkið hevur harnæst víst á, ein ávísur vøkstur hevur verið tey seinastu árini av børnum, sum eru innskrivað á barnaverndastovnar, og at hetta møguliga kann hava samband við, at við ikki hava ein familjudepil.

Ásannandi, at tørvur er á einum tilboði tilætlað familjuni, og ásannandi tørvin fyri at gera tilgongd til eitt tílíkt tilboð so smidliga sum møguligt, verður við hesum uppskoti sett á stovn ein Familjutænasta, sum á ávísum økjum er lík áðurnevnda Familjudeplinum, men sum harumframt er ein depil fyri fyribyrgjandi tænastur og hevur meir víðfevndar tænastur at bjóða - sjá undir pkt. 1.3.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Galdandi lóggáva ásetur í § 15 a, stk. 1, at landið skal hava eitt nøktandi samdøgurstilboð, og at visitering til hetta skal vera umvegis Føroya Kærustovn.

Núverandi tilboð hevur higartil einans verið ætlað familjum, sum hava latið seg innskrivað á Familjudeplinum, sum nú er latin aftur.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við lógarbroytingini er at tryggja eina enn meir smidliga skipan viðvíkjandi innskriving á eina Familjutænastu, sum umframt at bjóða viðgerð á stovninum eisini kann bjóða viðgerð í heiminum hjá familjunum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Ein Familjutænasta verður upprættað í samstarvi við Kommunufelagið, og kemur at verða fevnd av § 15, stk. 1. nr. 2, sum annars, sambært serligu viðmerkingunum til hesa grein, higartil bert hava fevnt um dagtilboð, sum varð veitt av øðrum stovni enn hjá landinum.

Tann nýggja Familjutænastan skal fevna um eitt tilboð, sum hevur tvey høvuðselement:

- Eitt fysisk hús, sum skal virka sum eitt viðgerðarstað og uppihaldsstað hjá familjum
- Eitt flytandi toymi, sum arbeiðir í heiminum hjá familjunum og í teirra netverki.

Omanfyri standandi skal gera tað møguligt hjá familjum at lata seg innskriva á ein viðgerðarstovn, har familjan kann fáa stuðlandi viðgerð frá einum sterkum fakligum umhvørvi, sum hevur fakliga vitan um børn og familjur við avbjóðingum.

Ætlanin er, at húsið / stovnurin skal rúma minst tveimum familjum í senn, og er málbólkurin familjur, sum hava avbjóðingar við foreldraførleikanum og við at fáa børnini at trívast.

Umframt eitt døgntilboð, sum skal tryggja mest útsettu børnini, er samstundis tørvur á viðgerð tætt at familjunum og teirra gerandisdegi. Tí er ætlanin, at Familjutænastan umframt at veita viðgerð inni á stovninum, eisini skal veita tænastur kring landið inni í heiminum hjá familjum. Hetta toymið skal eygleiða, gera kanningar, bjóða stuðlandi hjálp, so foreldraførleikarnir kunnu mennast og góðir vanar skapast við tí yvirskipaða endamáli, at barnið kann vera verandi í heiminum.

Fyri at gera visitering til Familjutænastuna smidliga, skal visitering ikki longur fara fram umvegis Føroya Kærustovn, men er avgerð frá barnaverndarnevndini í teim einstøku umráðnum at rokna sum visitering inn á Familjutænastuna. Visitering á Familjutænastuna er ein fyribyrgjandi fyriskipan og tískil treytað av samtykki frá foreldrunum.

Leiðslan á Familjutænastuni raðfestir, hvør skal hava viðgerð og nær, í tøttum samstarvi við avvarðandi barnaverndartænastu og familjuna.

Familjutænastan skal eisini í ávísan mun gera kanningar av børnum og stuðla undir, tá neyðugt er at fáa foreldraførleikakanningar gjørdar.

Ætlanin er, at Familjutænastan skal raðfesta fyribyrgjandi arbeiði í familjum eitt nú við at hava í starvi familjuráðgevar, sum kunnu seta í verk trygdarætlanir fyri familjurnar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Landskassin fíggjar omanfyri standandi loysn soleiðis: 1. mió. kr. í 2024, 4 mió. kr. í 2025, 4 mió. kr. í 2026, og 4 mió. kr. í 2027.

Ætlanin er, at viðgerðarstovnurin skal rekast sum ein felags kommunalur stovnur undir Kommunufelagnum, og skulu kommunurnar skipa seg soleiðis, at talan verður um eitt brúkaragjald frá barnaverndartænastunum fyri keyp av tænastum frá Familjutænastuni.

Tað verður Kommunufelagið, sum finnur høli til stovnin, og sum setur fólk í starv á Familjutænastuni.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið kemur at hava ávísar fyrisitingarligar avleiðingar fyri barnaverndarøkini, harvið kommunurnar, vísandi til, at tað nú verða barnaverndarnevndirnar, sum beinleiðis koma at visitera inn á Familjutænastuna.

Fakligi serkunnleikin, sum Familjutænastan fer at hava í sínum starvsfólkahópi, skal eisini í samstarvi við tær einstøku barnaverndartænastur, verða við til at seta neyðug átøk í verk.

Fyriliggjandi uppskot inniber eitt meir fevnandi útboð av tænastum, sum verður veitt út frá Familjutænastuni, men tó í samráð og samstarvi við tær einstøku barnaverndartænasturnar.

Væntast skal ikki stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur avleiðingar fyri øll økir í landinum, vísandi til, at allar kommunur eru partar av einum barnaverndaøki, og vísandi til, at landið hevur skyldu til at veita øllum familjum nøktandi tilboð, óansæð bústað v.m.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri tær familjur, sum tilskilað er á s. 2 niðast, tvs. sárbærar familjur í Føroyum.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Ongar avleiðingar

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Ongar avleiðingar

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Ongar avleiðingar

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru, og mett verður ikki, at uppskotið kann elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger ikki størri inntriv í rættindi hjá fólki, vísandi til, at innskrivan á Familjutænastuni einans kann verða framd við samtykki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld

**2.12. Gjøld**
Familjutænastan skal rekast sum ein felags kommunalur stovnur undir Kommunufelagnum, og skulu kommunurnar skipa seg soleiðis, at talan verður um eitt brúkaragjald frá barnaverndatænastunum fyri keyp av tænastum frá Familjutænastuni

Henda áseting er longu í núverandi lóg í § 15 a stk. 3, og verður nú víðkað til eisini at fevna um tænastur frá nýggja Familjudeplinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Talan er ikki um víðkaðar heimildir til landsstýrismannin ella kommunurnar í sjálvum sær.Tó ger fyriliggjandi uppskot tað møguligt hjá teim einstøku barnaverndarnevndum til beinleiðis at innskriva til Familjutænastuna, har tað áður skuldi umvegis Føroya Kærustovn.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | ja | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

*Til nr. 1*
Sambært serligu viðmerkingunum til núverandi § 15 stk. 1. nr. 2 fevnir ásetingin einans, hvat familjuviðgerð viðvíkur, um *dagtilboð,* ið familjan fær *frá øðrum*, enn stovni hjá landinum.

Endamálið við fyriliggjandi lógaruppskoti er at gera tað gjørligt at fáa størri útboð av tænastum, sum áður í ávísan mun lógu hjá Familjudeplinum, til nýstovnaða Familjutænastuna.

Núverandi § 15 byggir á høvuðsaðalmálini dagtilboð og samtykki. Ætlanin við fyriliggjandi broyting er at víðka um ásetingina, soleiðis at hon eisini kemur at fevna um samdøgurstilboð. Tó er viðgerð sambært § 15 stk. 2 nr. 2 framvegis treytað av samtykki frá tí / teimum, sum hava foreldramyndugleikan.

Talan er tí um at víðka ásetingina, soleiðis at hon fevnir um dagtilboð og samdøgursviðgerð, umframt at hetta kann verða veitt frá stovni hjá landinum, ella øðrum stovni.

*Til nr. 2*
Broytingin hevur við sær, at mál viðvíkjandi innskrivan á Familjutænastuni, ikki skulu umvegis Føroya Kærustovn til støðutakan. Hetta vil hava við sær, at barnaverndarnevndin við sínari avgerð beinleiðis kann innskriva á Familjutænastuna, og verður eitt millumlið í tí fyrisitingarligu prosessuni tí strikað, og hervið gerst skipanin enn smidligari.

*Til nr. 3*
Henda áseting er lík henni, sum er galdandi í dag. Við hesi áseting verður tað gjørligt hjá barnaverndarnevndini at veita fíggjarligan stuðul, sum standast av fyriskipanunum, har foreldrini sjálvi ikki megna útreiðslurnar.

Vavið av ásetingini er tað sama sum í núverandi § 15 stk. 3, men er orðað annarleiðis, vísandi til at samdøgurstilboðið, sum áður var Familjudepilin, nú verður fevnt av § 15 stk. 1. nr. 2 og nú kemur at eita Familjutænastan.

**Til § 2**
Gildiskoma verður sett til dagin eftir, at lógin er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 15. november 2024.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl verður sett inn eftir hoyring**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: